


Hugsa tær. Eina ferð við Norrønu, har tú og makin kunnu njóta ekslusivu atmosferuna í suituni á glæsiliga ferðamannaskipi føroyinga. »Jú, men tað kostar« vilja summi helst halda, men tað nýtist nú ikki at kosta so nógv.

Saman við Smyril Line og Føroya Sparikassa gevur Sosialurin nevnliga tær møguleikan at fara á dreymaferðina. Ferðast sjálvur annar á eini av rutunum hjá Smyril Line við øllum tí marglæti, sum stóra ★★★ ferðamannaskipið gevur tær.

Og tað er ikki nóg mikið við tí. Umborð á Norrønu hevur tú eisini sersømdir, tí Føroya Sparikassi gevur tær eina konto umborð, har tú kanst nýta upp til 10.000 kr. á ferðini. So skuldu ráðini verið til bæði eitt og annað.

Umframt høvuðsvinningin, verður eisini ein eykavinningur drigin. Hesin er ein ferð fyri tvey vaksin og tvey børn við bili til Danland í Blokkhus í eina viku.

Og tað er sera einfalt at vera við í kappingini. Sjey leygardagar á rað verður spurnarblað í Sosialinum, har tríggir spurningar skulu svarast. Fyrsta spurnarblaðið var í blaðnum 11. september, og er talan hesaferð sostatt um næsta umfarið. Tá øll spurnarbløðini eru svarað, skulu hesi sendast okkum í einum brævbjálva. Brævbjálvin skal merkjast »dreymaferð« og skal sendast til:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Bert seðlar, sum eru kliptir úr Sosialinum kunnu vera við í kappingini. Loyvt er ikki at senda avrit av seðlum.

Saman við svarlepanum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummari hjá tær. Svarleparnir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. oktober, og leygardagin, 30. oktober verður so almannakunngjørt, hvørji eru hepnu vinnararnir.






Sosialurin

**DREYMAFERÐIN 4. UMFAR**

Hesaferð snúgva spurningarnir seg meira ella minni um almenna vitan

1 Hvussu stórt er hallið á fíggjarlógini, sum varð almannakunngjørd hósdagin.

2 Tvey føroysk fótboltsfeløg fylla í ár 100 ár. Hvørji eru tey

3 Hvussu eitur stjórin á Føroya Fiskavirking.

FØROYAPRENT - TEL. 314 555



# Framsýning í Müllers pakkhúsi

**Í sambandi við, at bøkurnar Havnar søga 1 og 2 koma út, skipar Tórshavnar kommuna saman við Tórshavnar Býarsavni og Føroya Fornminnissavni fyri framsýning í Müllers pakkhúsi.**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Søgufrøðingarnir Jens Pauli Nolsøe og Kári Jespersen hava í nøkur ár arbeitt burturav við einum bókaverki um Havnar søgu frá landnámi til okkara dagar. Nú er komið somikið væl áleiðis við arbeiðinum, at fyrsta og onnur bók, ið er um tíðarskeiðið frá landnámi til 1816, verða at fáa til keyps.

Í høvuðsheitum er fyrsta bókin um frásagnir og samtíðarlýsingar av Havnini, fornfrøðiligar rannsóknir í gomlu Havnini, ting- og rættarviðurskifti, bóndagarðin Húsagarð og vinnur hjá havnarfólki, einahandilin fram til umleið 1790 og staðanøvn innan- og uttangarðs í Havnini.

Onnur bókin er í høvuðsheitum um Vágsbotnshandilin 1768-1793, kongliga handilin frá umleið 1790 til 1816, skansa-verkið, hospitals- og heilsuviðurskifti, kirkjurnar, skúlarnar í Havn, og hvussu Havnin veksur og mennist fram til umleið 1816.

Høvundarnir hava eisini gjørt eina roynd at endurskapa fólkavøksturin, demografisku gongdina í Havn og í Føroyum í tíðini frá 1600 til 1816.

Havnar søga 1 og 2 er prýdd við nógvum myndum, kortum, skitsum, tekningum og skjølum, sum almenningurin ikki áður hevur sæð. Sumt av hesum tilfari verður endurgivið á framsýningini, har eisini fornlutir eru at síggja.

Jónhild Johannessen, arkitektur, hevur sniðgivið framsýningina. Dekostovan hevur staðið fyri grafisku uppsetingini.

Framsýninigin í Müllers pakkhúsi er opin frá 1. oktober til 24. oktober, seinnapartin.

**Diabetes evnisdagar á apotekunum frá 5. - 7. okt. 2004**

Serfrøðingur í diabetesútgerð frá Hermetico sýnir fram nýggjastu:

Blóðsukurmátarar
Insulinpennar og kanylir
Blóðtrýstmátarar
Kroppsfitimátara

Havi egið blóðsukurtól við og fái tað kannað
Mátingar: Blóðsukur, blóðtrýst, kroppsfiti
Smakkiroyndir: Sukurfrí bomm

Diabetikarar og áhugaði fyri diabetes viðgerð eru hjartaliga vælkomin!

| | | |
|---|---|---|
| Tjalduns apotek | 5.okt. | 10:00 – 17:00 |
| Eysturoyar apotek | 6.okt. | 9:30 – 11:00 |
| Norðoya apotek | 6.okt. | 14:00 – 17:00 |
| Suðuroyar apotek | 7.okt. | 12:30 – 15:00 |

APOTEKSVERKIÐ WWW.APOTEK.FO

ÍLATIN TIL VETURIN

Tidy Car er til reiðar
at verja bilin hjá tær móti
salti og vetrarfrosti.
Sertilboð kr. 2.750,-
Sí heimasíðu okkara
www.reyniservice.fo



Ziebart TidyCar
REYNI SERVICE P/F
TEL 35 30 40 · FAX 35 30 41 · WWW.REYNISERVICE.FO

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Ógloymandi
JÓLABORÐHALD
Aftur í ár stíla vit fyri borðhaldi, dansi, vistarhaldi og flutningi!
- tú skalt bara vera í veitslulag!

Legg saman útferð, jólaborðhald, gisting og dans og tú fært:
eina stóra jólaveitslu!
fyri 595,-
v/ gisting og flutningi úr Havnini

27. nov.: "Twilight"
4. & 11. des.: "Fimmboði & Jógvan"
undirhalda og spæla til dans

Jólaveitsla og dansur 250,-
Dansur frá kl. 11.00 100,-

Jólaborð til hurðina úr 98,-
Smyrjibreyð 18,-
Vit koyra eisini út uttanfyri Vágoynna
- Ring og hoyr nærri!

Bíleggið í góðari tíð á tel 33 29 55
- avmarkað atgongd!

Ring og vit senda okkara spennandi jólamatskrá!
Jólaveitsla er í døgunum 27. nov., 4. des. og 11. des. frá kl. 19.00.
Annars fyriskipa vit veitslur eftir avtalu.

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA • SØRVÁGUR • TEL 33 29 55 • hotel@ff.fo



**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




**Billettprísur: 55,- kr.**
Leygardagin 02.10. kl. 17[00]
Leygardagin 02.10. kl. 19[00]
Sunnudagin 03.10. kl. 16[00]
Sunnudagin 03.10. kl. 18[00]




Leygardagin 02.10. kl. 20[15]
Leygardagin 02.10. kl. 23[15]
Sunnudagin 03.10. kl. 19[15]
Sunnudagin 03.10. kl. 22[15]




Leygardagin 02.10. kl. 21[00]
Sunnudagin 03.10. kl. 20[00]




Leygardagin 02.10. kl. 22[45]
Sunnudagin 03.10. kl. 21[45]




**Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.**
Leygardagin 02.10. kl. 18[00]
Sunnudagin 03.10. kl. 17[00]

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**